


# Skjóta seismikk eystan fyri Suðuroynna

Deil:

**Jan Müller**

08.07.2014 - 10:34

Oljan.fo

Nú er nakað síðani, at vit hoyrdu um seismikkskip í føroyskum sjógvi. Men okkurt bendir á, at nú er røringur aftur á hesum øki. Sambært heimasíðuni hjá MRCC skjýtur Atlantic Explorer seismikk á landgrunninum í ein eystan úr Suðuroynni. Skipið arbeiðir fyri PGS Geophysical AS.

Skipið skal skjóta seismikk í fýra dagar frá 4. Juli á hesi positión: 61.08 N 004.34 W, 61.28 N 005.26 W.

Vaktarskip er Thor Chaser, sum Thor í Hósvík eigur.

Jarðfeingi hevur sum skilst givið loyvi til fleiri forkanningar í ár. Seinni í ár kemur m.a. Ramform Challenger, men mesti parturin av tí arbeiðinum er í bretskum øki.

Oftani noyðast skip, sum arbeiða í brestkum øki, eisini inn á føroyskt øki fyri at kunna fullføra sítt arbeiði, og tað er ikki altíð, at hetta er tengt at seismiskum arbeiði í føroyskum øki.